# Nú skulu pengarnir til arbeiðis

*Føroya Sparikassi og íslendski íløgubankin Kaupthing HF stovnaðu í gjár fyrsta føroyska virðisbrævameklarafelagið, sum eitur Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F*




*Leiðslan í Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F á tíðindafundi í Føroya Sparikassa í gjár. Frá vinstru: Johnie Brøgger, nevndarlimur, Sigurður Einarsson, nevndarformaður, Peter Holm, stjóri, Marner Jacobsen, næstformaður og Bjarni Olsen nevndarlimur. Fimti nevndarlimurin er Jógvan Páll Lassen. (Mynd: Jens Kristian Vang)*

EDVARD JOENSEN

Fyrsta føroyska virðisbrævameklarafelagið, Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F, varð stovnað í gjár.

Á tíðindafundi fyrrapartin í gjár varð upplýst, at íslendska felagið Kaupthing HF og Føroya Sparikassi høvdu stovnað Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F við 12 milliónum krónum í partapeningi. Býtið er 51% til íslendingar og 49% til Føroya Sparikassa.

Treytin fyri at stovna felagið var, at partapeningurin var minst ein millión Evrur, ella góðar sjey milliónir danskar krónur. Roknað verður við, at felagið kemur í gongd av álvara einaferð í summar, tá øll loyvi til virksemið, ætlanin er at fara undir, eru klár.

Forstjórin í Kaupthing HF í Íslandi, Sigurður Einarsson er nevndarformaður í nýggja føroyska felagnum. Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa er næstformaður. Hinir nevndarlimirnir eru Johnie Brøgger, frá Kaupthing í Luxembourg, Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa og Jógvan Páll Lassen, advokatur. Stjóri í nýggja føroyska felagnum er Peter Holm, sum eisini var stjóri í Kaupthing í Føroyum, áðrenn Føroya Sparikassi kom uppí.

Nevndarformaðurin í Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F, Sigurður Einarsson, forstjóri í Kaupthing HF, sigur, at ein grund til, at teir júst valdu at fara í samstarv við Føroya Sparikassa er, at Føroya Sparikassi longu frammanundan hevur eitt rættiliga gott kundanet í Føroyum.

Føroya Sparikassi hevur samband við at kalla hvørt mansbarn í landinum so ella so. Soleiðis skuldi tað eisini hin vegin verið lættari hjá føroyingum at fingið samband við Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F, sigur hann.

Kaupthing HF hevur ikki havt samráðingar við aðrar møguligar samstarvsfelagar í Føroyum enn Føroya Sparikassa, sigur Sigurður Einarsson.

Tað er við í avtaluni millum Føroya Sparikassa og Kaupthing HF, at Føroya Sparikassi skal hava møguleika at keypa seg inn í íslendska felagið, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa. Og hóast tað ikki er nøkur treyt, liggur tað líkasum í kortunum, at Sparikassin eisini fer at gera tað, sigur hann.

Hjá íslendska felagnum starvast 180 fólk í Íslandi, meðan tað á deildunum uttanlands, til dømis í Luxembourg, Svøríki og USA starvast onnur 30 fólk. Hjá Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F fara trý fólk at arbeiða at byrja við. Men gongur, sum teir vóna og vænta, fer starvsfólkatalið at økjast nakað skjótt. Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F fer at halda til í umsitingarbygninginum hjá Føroya Sparikassa við Tinghúsvegin. Kaupthing hevur leigað bygningin, nú Føroya Sparikassi flytir yvir til Strond í gamla Fiskasølubygningin.

Síðan Kaupthing byrjaði virksemið í Føroyum 1. mars í ár, er undirtøkan støðugt vaksin, sigur Peter Holm, stjóri í Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F. Í dag umsitir felagið eina milliard krónur fyri ymsar kundar. Men sum vera man ætlar stjórin at økja virksemið og fáa fleiri kundar. Og fyrsta stigið tann vegin er nýggja felagið, sum nú er stovnað.

Í hesum sambandi varð nevnt á tíðindafundinum - uttan at tað kortini varð váttað - at mett verður, at einar fimm-seks milliardir føroyskar krónur eru úti á fremmandum peningamarknaðum til arbeiðis. Og tann partin vil leiðslan í Kaupthing Føroya Virðisbrævameklarafelag P/F fegin fáa heim í teirra felag at arbeiða við.

At tað júst vóru Føroya Sparikassi og Kaupthing HF, sum fóru í samstarv, er einki ónatúrligt í, sigur stjórin í Føroya Sparikassa. Kaupthing HF er fyritøka, sum íslendskir sparikassar eiga.

Eitt virðisbrævameklarafelag - á donskum børsmæglerselskab - er felag, sum stutt og greitt skal fáa pengarnar hjá fólki og fyritøkum at arbeiða og kasta aðrar pengar av sær, sigur Peter Holm, stjóri í Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F.

Nýggja felagið fer at ráðgeva privatfólki og feløgum um handil við virðisbrøvum, sigur Peter Holm.

Sum dømi nevnir hann, at Kaupting Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F fer at selja íløgufeløg, har fólk kunnu seta pening í, sum so víðari verður settur í onnur feløg. Sum til dømis við at keypa partabrøv á altjóða partabrævamarknaðinum.

Tað er soleiðis, at tú sum privatpersónur kanska ikki hevur tær heilt stóru nøgdirnar at handla við, men tá fleiri taka seg saman í eitt felag, kann hetta felagið spjaða íløguna víðari, og íleggjarin fær so vinning aftur eftir egnum innskoti. Soleiðis ber eisini til at sleppa undan, at allur peningurin verður lagdur á einum stað, men spjaddur á ymsar marknaðir. Av tí sama minkar tapsvandin eisini beinanvegin, sigur Peter Holm.

Og tað verður lætt hjá føroyingum at fara á partabrævamarknaðin í Tokyo ella Frankfurt. Í deildini við Norðskála fer at bera til at seta pening í eitt íløgufelag hjá Kaupthing Føroya Virðisbrævameklarafelag P/F, sum so aftur brúkar pengarnar hjá tær at keypa partabrøv í einumhvørjum týskum banka ella japanskari bilverksmiðju.

Gongdin aðrastaðni hevur verið seinnu nógvu árini, at gingið er frá at hava pengin standandi á bók, men ístaðin at seta hann í partabrøv, sum arbeiða á marknaðinum og vinna pening innaftur. Og tað er hesa gongdina, Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F fer at royna at fáa føroyingar inní.

# Føroya Arbeiðsgevarafelag havt aðalfund

*Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði aðalfund fríggjadagin. Nevndin varð afturvald*



Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði aðalfund um vikuskiftið. Tveir nevndarlimir stóðu fyri vai, og vórðu teir báðir afturvaldir.

Nevndin skipaði seg eftir aðalfundin, og hon heldur fram óbroytt. Vilhelm M. Johannesen er formaður, og Kristoffur Laksá er næstformaður. Hinir nevndarlimirnir eru Johan Páll Joensen, Magni Arge, Leivur Michelsen, Gudmundur Mortensen og Bergur Poulsen.

Á aðalfundi hjá Arbeiðsgevarafelagnum verða stór vinnumál og samfelagsmál annars umrødd, sum vitiligt er. Og aðalfundurin gjørdi eisini nøkur heilt konkret vinnupolitisk tilmæli, sum til ber at lesa á heimasíðuni hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag á Internetinum. Adressan er:

**www.industry.fo**

Nevnd verða til dømis útbjóðing av almennum uppgávum, fiskivinnupolitikkurin, barnaansing, møguleiki fyri inntøkujavning í skatti og Føroyar sum kunningarsamfelag.

Tíðindablaðið Sosialurin fer seinni at gera meira burtur úr ársfrágreiðingini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

ej



e-mail: jakup@sosialurin.fo

**Ítróttur**

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**ÍtróttaSosialurin kann sjálvandi eisini lesast á alnetinum:**

**www.sosialurin.fo**

# Stórsigrar og fleiri javnleikir

*Eftir triðja umfar: Meistararnir úr Klaksvík fingu staðfest, at kappingarárið verður sera strevið, og sumbingar fáa tað meiri enn torført*




*Á myndini er tað leikandi sviin hjá B36, sum liggur skerflatur, men tá avtornaði vóru tað vágamenn, sum lógu eftirá, eins og øll mótstøðuliðini hjá B36 hava gjørt tað higartil í kappingarárinum*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Í so góðum fótbóltslíkindum, sum tað ber til at ímynda sær, varð triðja umfarið í ár 2000 kappingini spælt sunnudagin.

Hesa ferð varð ein spælari sendur undir brúsu við reyðum korti í viðførinum. Tað var Janus Kjærbo hjá VB.

Gulu kortini vóru fimtan í talið ella trý í hvørjum dysti. Hetta miðaltalið er høgt, tá sammett verður við miðaltalið í nógvum av grannalondum okkara.

At tað í trimum av fimm førum endar við, at liðini fáa eitt stig í part er óvanligt, men tað er meiri enn so komið fyri áður. Seinast var í 15. umfari í fjør: Sumba–GÍ 1–1, B68–VB 0–0 og ÍF–B71 3–3.

Síðani reglarnir fyri úrtøku vórðu broyttir, soleiðis at vinnarin fær trý stig, hevur tað smakkað serliga væl hjá vinnarum, at nógvir dystir enda við javnleiki.

### Alt gongur undan

Í fótbólti er hvør einasti dystur serstakur. Tí ber tað ikki til uttan nakað sum helst at sammeta úrslit, men tað tá trý umfør eru farin, er tað upplagt at kaga eftir og sammeta gongdina í uppgerðum, har somu lið hava verið við.

Hjá B36 viðhaldsfólki kendist tað serliga summarligt bæði í fyrradagin og í gjár. Teir hølvaðu FS Vágar av, og hýrurin í Gundadali gjørdist ikki verri, tá tað frættist, at HB og NSÍ høvdu spælt javnt í Runavík.

Fyri tey í B36 má tað kennast serliga hugaligt, at fleiri av ungu monnunum, sum eru vaksnir upp í felagnum, nú mannað oddaliðið. Av teimum trettan, sum vóru á vøllinum sunnudagin, hava seks altíð spælt í B36, og vit kunnu eisini taka Ronnie Samuelsen, sum kom úr EB/Streymi sum unglingur, við í henda bólkin.

B36 misti undan kappingarárinum sjey spælarar. Spurningurin er, hvussu tað hevði havt gingið, um Egin, Pól, Ninoslav, Tomislav, Djóni, Øssur og Arnbjørn høvdu verið á liðnum. Tað hevði í hvussu so er havt við sær, at onkrir, sum nú spæla í 1. deild ikki høvdu havt møguleikan, men úrtøkuna hevði tað ikki borið til at fingið størri, enn hon hevur verið higartil.

Per Olov Andersson hevur undanvind. Størsta uppgávan hjá honum komandi vikurnar verður at halda spælararnar á jørðini, men tað kemst ikk uttanum, at tað sær sera ljóst út: sumbingar í Gundadali og sandoyingar á Sandi áttu at verið uppgávur, sum oddaliðið væl og virðiliga megnaði. Og so verður spurningurin, um klaksvíkingar longu hava mist alt á gólvið, tá teir í sætta umfarinum koma í Gundadal.

### Mótvindur í Klaksvík

Undan kappingarbyrjan hevði eingin roknað við, at klaksvíkingar skuldu kenna tað sum ein lætta, at teir í triðja umfarið komu á stigatalvuna eftir javnleik á heimavølli móti VB. Í Klaksvík vóru tey ikki nøgd sunnukvøldið, men tapið fríggjakvøldið móti VB gav eina kenslu av, at tað eisini kundi kiksa sunnudagin, og so var javnleikurin á onkran hátt ein lætti.

Enn eru nógv stig at spæla um, men tað er ein royndur lutur, at komandi vikurnar fara at hava sera stóran týdning fyri KÍ. Sunnudagin skulu teir spæla í Gøtu, so kemur B68 at vitja, og so skulu teir vitja B36!

Kanska kann tað vera ein uggi fyri klaksvíkingar at finna í høgtølunum. Tá KÍ í 1991 vann fyrsta FM heitið í 19 ár, gekk striltið fyrstu umførini. Teir taptu 1–0 móti NSÍ (tað hava teir eisini gjørt í ár), teir spældu 2–2 móti VB (tað hava teir eisini gjørt í ár), og ta ferðina var úrslitið móti MB á heimavølli 0–0. Tað var ikki fyrrenn í fjórða umfarinum, at klaksvíkingar í 1991 vunnu.

Trýstið er stórt, nú KÍ fer til Gøtu. Trýstið er eisini stórt á GÍ, sum meiri enn hálvkiksaði á Sandi, men trýstið er størri á KÍ, sum tað hevur verið roknað so nógv meiri við í ár, enn tað hevur verið roknað av GÍ.

Tá úrtøkan er soltin, fær tosið, um hvat átti at verið øðrvísi, bein at ganga á. Venjarin frá í fjør hevur úr USA sent heilsanir til viðhaldsfólkini og spælararnar. Hetta kann ivaleyst tulkast á ymsan hátt, men at sálarliga nærveran hjá gamla venjaranum tyngir um arbeiðið hjá nýggja venjaranum og ivaleyst eisini hjá nevndini, er neyvan nakað at ivast í.

Í fjør vóru skaðarnir fáir ella eingir. Í ár hava teir verið nógvir, og tað ger ikki hýrin betri. Fótbóltsprátið er altíð nógv í Klaksvík, men fyritreytirnar at práta eru øðrvísi nú, enn tær vóru í fjør!

### Sumbingar illa sperdir

B71 og Sumba hava verið mett sum mest uppløgdu boðini uppá niðurflyting. Sandoyingar hava higartil skavað fýra stig saman, meðan sumbingar eru sørir. Í sætta umfarinum fær Sumba vitjan av B71, og um sandoyingar ta ferðina fáa øll stigini fer tað at síggja heilt illa út hjá Sumba.

Undan kappingarbyrjan varð roknað við, at vágaliðið skuldi standa seg betri, enn vágamenn áður hava gjørt í bestu deildini. FS Vágar hevur ikki staðið seg væl, og stóri ósigurin í Gundadali móti B36 leggur eitt stórt trýst á teir. Sunnudagin fáa teir í Sørvági vitjan av HB. Í steypakappingini stóð FSV seg væl móti HB, men síðani tá hevur tað gingið rætta vegin hjá HB, sum ikki enn hevur tapt.

NSÍ hevur heldur ikki tapt higartil. Sunnudagin skulu teir til Vágs, og tá fáa teir møguleika at hevna 0–2 tapið á heimavølli í steypakappingini. Vágbingar prógvaðu í Klaksvík fríggjakvøldið og sunnudagin, at teir framvegis ætla sær at vera meiri enn kanónføði.

JH




*Hjá KÍ hevur hinvegin ikki gingist nakað serligt, og nú man trýstið merkjast hjá leikarum og venjara*

***Mynd: Sáh***